# Nú skínur sólin

Nú skínur sólin, og nú er lytt,
og nú er himinin bláur;
og útsynningur seg hevur kítt,
til tess hvør steinur gjørdist táur.
Nú skalt tú sleppa út at spæla tær,
og gulu prukku skalt tú saðla tær.
    Ríð so avstað,
    øll vita tað,
at tú ert fittur og knáur.

Bint tvongin væl, annars dettur tú,
set húgvu tína út á vanga,
tær væl í rygginum fettur tú,
tí nú skal hesturin ganga.
Her kemur ein, av vegnum fara øll,
tú ríður líka inn í kongsins høll.
    “Her komi eg,
    síggja tit meg!
Eg reið mær vegin hin langa”

Halt fram, hin rádni, so vinnurt tú,
lat ongan skúgva teg av vegnum,
so alt tað vakrasta finnur tú,
sum trívst í ljósum og degnum.
Enn er títt ross bert gula prukka mín –
men tá tú verður stórur, hestur tín
    bera teg skal
    eingi og væl
mót bjørtum ljósi, móti degnum.

Hans Andrias Djurhuus gav sínar barnarímur út í 1915, og “Nú skínur sólin” er ein av teimum. Lagið er sum “So vakrar moyggjar”. jd